KT-vør›ar fingi› prógv

Jákup Mørk

Fyri gó›ari viku sí›ani, fingu fyrstu føroysku skúlaærarnir handa prógv sum KT-vør›ar.

Útbúgvingin er úrslit av teirri ni›urstø›u, sum ein arbei›sbólkur hjá KT-deplinum og undirvísingar- og mentamálast‡rinum kom til, tá framtí›ar bygna›urin av skúlaverkinum var› lagdur til rættis.

Fyri gó›ari viku sí›ani fingu fyrstu føroysku KT-vør›arnir handa› prógv síni. Ta› er teldufyritøkan, Formula fo, sum hevur sta›i› fyri undirvísingini

Í samstarvi vi› vinnuna

Gjørt var› sí›ani av, at nakrir lærarar skuldu fáa møguleika at útbúgva seg á hesum øki, solei›is at hesir í framtí›ini kundui gerast KT-vør›ar, ella netumsitarar, hjá skúlunum.

Greitt var› beinanvegin, at hetta mátti gerast í samstarvi vi› vinnuna, og eftir at hava kanna› teir møguleikar, sum fyrilógu, var› gjørt av, at taka av tilbo›i frá Formula Fo.

Almennu myndugleikarnir vóru sera fegnir um, at serkunnleikin innan hetta øki kundi finnast í Føroyum, eins og ta› eisini var gle›iligt, at henda tænasta kundi veitast til ein kappingarføran prís.

Fyri hálvum ári sí›ani var› so skjøtul settur á útbúgvingina, og hósdagin í farnu viku fingu so 22 lærarar handa KT-prógvi›. Hesi eru tó enn ikki li›ug at útbúgva seg, tí eftir ætlan skulu tey útbúgva seg enn meira, og ver›ur seinni partur av útbúgvingini li›ugur á sumri 2001.

T‡dningarmiki› vi› samstarvi

Tá prógvini vór›u handa›, førdi Torkil Holm, stjóri, fram rø›u vegna Formula Fo, har hann fyrst og fremst takka›i fyri, at teirra virki› var› valt sum samstarvsfelagi hesum vi›víkjandi.

Torkil Holm greiddi frá, at tá hetta var fyrsta fer›, at slík útbúgving var› givin í Føroyum, mátti eitt umfatandi arbei›i til, fyri at seta útbúgvingina saman. Hetta hev›i tó eftir hansara tykki eydnast sera væl, ikki minst takka veri› gó›a samskiftinum, sum hev›i veri› millum partarnar.

Júst samskifti og samstarv millum almenna og privata sektorin, var naka›, sum Torkil Holm leg›i stóran dent á í rø›u síni. Tá hann skuldi l‡sa fyrimunirnar vi› hesum samstarvi›, málbar hann seg solei›is:

»Sjálvandi eru ymiskar hugsanir um, hvussu umfatandi almenni sektorurin eigur at vera og hvat virkisøki› hjá honum skal vera, men so miki› er vist: Almenni sektorurin má vera effektivur í sínum tænastum, tí tær eru t‡›andi fyri virkisføri› í øllum pørtum av samfelagnum. Ikki minst er hetta galdandi fyri undirvísingar- og skúlaverki›

Ta› almenna og privata vinnulívi› vera tí›um sett upp ímóti hvørjum ø›rum. Men vit skulu ikki gloyma, at ta› almenna kann hava stóran t‡dning fyri menningina av vinnulívinum. T.d. vi› at stu›la vinnulívi›, men sanniliga eisini vi› at seta krøv til vinnulívi›, tá i› ta› bi›ur um vørur og tænastur ha›ani.

At heimamarkna›urin veruliga setur strong krøv, hevur sera stóran t‡dning fyri menning okkara sum útflutningsfyritøka, og her hevur ta› almenna ein t‡›andi leiklut. Tí eru vit sera fegin um hetta stigi›, sum Undirvísingar- og Mentamálast‡ri› og KT-depilin hava tiki› og ta› samstarv, sum ta› hevur elvt til.«

At enda takka›i Torkil Holm KT-deplinum og undirvísingar- og mentamálast‡rinum fyri ta› álit, teir høvdu s‡nt, tá Formula fo var› valt til hesa uppgávu, eins og hann ynskti n‡ggju KT-vør›unum hjartaliga tillukku vi› útbúgvingini, sum teir nú høvdu sta›i›.

Gagnlig útbúgving



Ein teirra, sum nú hevur fingi› prógv sum KT-vør›ur, er Nick Thomsen

Jákup Mørk

Millum teir lærarar, sum í farnu viku fingu handa› prógv sum KT-vør›ar, var Nick Thomsen. Umframt at vera KT-vør›ur, er Nick eisini forma›ur í n‡stovna›a KT-var›a felagnum, sum sera hóskandi var› stovna›, beint sum vit komu inn í n‡ggju øldina.

Teknisk frálæra

Nick grei›ir frá, at teir seinasta hálva ári› hava veri› ein dag um vikuna í hølunum hjá Formula, har teir hava siti› á skúlabeinki.

Hann sigur ví›ari, at undirvísingin hevur serliga fevnt um røkt av teldunum hjá skúlunum, her undir røkt av st‡risskipanum, netskipanum og ambætarum.

Prógvi›, sum teir nú hava fingi›, er fyrsti li›urin í útbúgvingini, og me›an hesin parturin hevur fevnt um tann tøkniliga partin av starvinum hjá KT-vør›unum, fevnir seinni parturin um pedagogiska øki›.

Teldan sum ambo› í skúlanum

Upp á spurningin, hvørt hann væntar at fáa stóra gle›i av útbúgvingini, svarar Nick, at hann sær hetta sum ein ney›ugan part av skúlaverkinum, har ta› er av stórum t‡dningi, at telduøki› koyrir, sum ta› skal.

Eitt er, at hetta er ein ney›ugur partur av skúlanum, men Nick vænta›i sær avgjørt eisini at fáa stóra gle›i og nyttu av n‡ggju útbúgvingini.

Partvíst tí hetta gevur KT-vør›unum førleika at undirvísa lærarum og næmingum í n‡tslu av teldum og forritum, og partvíst, men ikki minst, tí hetta er vi› til at fáa telduna inn sum eitt náttúrligt ambo› í skúlanum.

Postfelagi› vil tosa um útberingina

Postfelagi› vil ikki missa útberingina av føroysku blø›unum, og teir eru sinna›ir at finna eina loysn, sigur forma›urin hjá postmonnunum

Forma›urin í Postfelagnum kemur nú upp í máli› um útberingina av føroysku blø›unum.

Hann heldur, at ta› ber til at finna eina loysn, so ta› framyvir eisini ver›a postmenninir, sum fara at bera blø›ini út.

Seinastu tí›ina hevur veri› nógv tosa› um Postverk Føroya. Stovnurin manglar pening, og ta› hev›i veri› ein dyggur fíggjarligur smeitur fyri Postverki›, um føroysku blø›ini fóru undir sína egnu útbering, solei›is sum tey hava hótt vi›.

Spurningur um prís

– Sjálvandi vilja vit bera blø›ini út um kvøldi›, men ta› er bara ein spuringur um prís.

Hetta sigur forma›urin í Postfelag Føroya, Sunleif Højgaard. Hann roknar vi›, at flestu postmenninir eru samdir vi› honum. Men ta› veldst um lønina.

– Vit eru til rei›ar at seta okkum ni›ur og finna eina loysn, sigur Sunnleif Højgaard.

Í sta›in fyri at fara at bera post út tvær fer›ir um dagin, er eitt alternativ bara at bera post út um kvøldi›.

Hesum tankanum avvísir Sunleif Højgaard ikki, men hann heldur, at ta› er vert at kanna henda møguleika.

– Vit eru noyddir at taka hædd fyri tí, sum kundanir ynskja, sigur Sunleif Højgaard.

Enn hevur Postfelagi› ikki vi›gjørt henda møguleika saman vi› Postverkstjóranum ella innanh‡sis.

– Vit vilja hava eina loysn á málinum, og vit eru ikki sinna›ir at missa blø›ini.

Byrja vi› at bera út fríggjakvøld

Seinasta ári› hava blø›ini sjálvi bori› blø›ini út fríggjakvøld. Hetta hevur kosta› blø›unum sera nógv, tí ta› hava bara veri› Dimmalætting og Sosialurin til at gjalda fyri útberingina.

Fyri at kunna fíggja ein part at hesari útbering, hava blø›ini ætlanir um at byrja at bera t‡sdagsbla›i› út eisini, tí tá eru ta› nógv reklamublø› at bera út.

Fyri at for›a fyri at blø›ini fara at bera út t‡sdag, er Postfelagi› sinna›, at fáa samrá›ingar útberingina fríggjakvøld. Men Sunnleif Højgaard sigur seg ikki kenna stø›una hjá Postverkinum til hetta.

Hann leggur aftrat at Postfelagi› er opi› fyri øllum møguleikum, og kemur ta› ein gó› loysn á stø›uni, er Postfelagi› sinna› at vera vi›.

Postfelagi› hevur ikki veri› so nógv inni í málinum um útberingina av blø›unum.

Ta› einasta, teir hava veri› vi› í, er ein kanning um, hvat ta› kostar at bera blø›ini út um kvøldi›, sigur Sunleif Højgaard.

Annars hava teir einki n‡tt hoyrt frá Postverkstjóranum.

– Vit meta ikki, at ta› er tosa› nóg nógv saman í hesum málinum, sigur Sunleif Højgaard.

2 ´arin

Leygardagur 4. mars 2000

Prestur flytir

Hóast tey vóru væl móttikin og altíð hava havt tað gott í Vestmanna, flytir prestafamiljan nú til Fuglafjarðar. Tað er sunt bæði fyri prest og kirkjulið, at skift verður viðhvørt, sigur Uni Næs, sóknarprestur. Les síðu 20 og 21

Diplomatur í politbúna



Mynd: Jens Kristian Vang

SAMRØÐA. Lógin skal handhevjast, men samstundis ræður um, at fáa gerandisdagin at glíða. Borgarar og politi skulu liva í sama lítla samfelag. Teir kenna hvønn annan. Eru í familju. Og hetta setur heilt serlig krøv til bygdarpolitistin. Á politistøðini í Miðvági situr Reðin Leonsson, virkandi sýslumaður í Vágum. Reðin Leonsson er sørvingur og hevur arbeitt sum politistur í Vágum síðani 1989. Les miðsíðurnar